

*Áhugaverda danska listakvinnan Kathrine Ærtebjerg arbeiddi í Grafiska Verkstaðnum hetta árið*




*Speisemi, skemt og dugnaskapur ganga hond í hond í myndum Peter Carlsens*

hvat, kunnu tey ikki haldast uttan fyri politiska ávirkan og hetta má mentamálaráðið eisini hava í huga til, tá tey fara at endurskoða bygnaðin fyri Listasavn Føroya.

## Aðrir glottar

Av øðrum áhugaverdum listaupplivingum í árinum, sum fór, kunnu nevnast framsýningarnar hjá ávikavíst Jensinu Olsen og Sámal Blak í hølum mentamálaráðsins og framsýningarnar hjá Rannvá Mortensen, Hanna Bjartalíð og Bárði Jákupsson í Galerie Focus. Framsýningin hjá Øssi Johannesen í Gallarí Fríðriksvág var rúgvusmikil og eitt sindur óruddilig. Var hon ikki tað, var lættari at fáa eyguni á perlurnar, sum í roynd og veru vóru millum tær stóru, einfalt málaðu figurkompositiónirnar í orange, svørtum, reyðum og bláum. Stílurin er nýekpsressivur og naivt symbolskur. Sjálvsmyndin og lívsfrágreiðingin eru sentral myndevni hjá Øssi Johannesen, har plágaði einstaklingurin verður lýstur í millum ljós og myrkur ella stríðandi millum tað góða og tað ónda. Í mun til hesar myndirnar tykist huglagið í myndunum hjá Símuni Poulsen øðrvísi einfalt og ljóst. Saman við Verkstaðnum á Brekku í Klaksvík hevði Símun framsýning í caféini Galleri Jinx í fjør. Vit kenna hansara herligu myndir frá eitt nú Ólavsøkuframsýningini, sum Símun hevur luttikið í fleiri ferðir. Myndevnini eru eygleiðingar úr gerandisdegnum: hús, vegir, innbúgv, bátar, bilar osfr og úttrykkið ber brá av barnsligum góðvarni. Onkrastaðni hevur listamaðurin skrivað á myndina til tess at greiða frá myndevninum, eins og sjónarhornið á sama hátt tykist naivt og øðrvísi. Framsýningin “Greivadømi” við myndum hjá Karl Einarsson Dunganon, sum Edvard Fuglø setti upp í Norðurlandahúsinum var eisini sera áhugaverd.

## Smyril – størsta savnið av yngri list

Tað var sjálvandi ikki bert í høvuðsstaðnum, at listarligi aktiviteturin var høgur í 2005. Suðuroyingar ( og vit onnur) fingu eitt flótandi listasavn við nýggja skipinum, sum er myndprýtt við frálíkum myndum hjá yngra ættarliðinum í føroyskari myndlist frá Anker Mortensen til Rannvá Kunoy. Ribarhús í Fuglafirði hevði í heyst eina framsýning við steinprentum hjá Torbjørn Olsen. Myndevnini stavaðu øll frá altartalvunum, sum Torbjørn hevur arbeitt við seinastu árini. Frálíku verkini eru øll framleidd í Grafiska Verkstaðnum í Gundadali, har sera nógv virksemi hevur verið farna árið. Verkstaðurin hevði framsýning í Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn og í Sønderjyllands Kunstmuseum. Saman við framsýningini kom ein bóklingur “Tryk”, har m.a. kendi danski listamaðurin Bjørn Nørgård hugleiðir um verkstaðin: ”Et værksted har en ånd, sjæl, eller rettere en besjæling af de ting, der udføres i værkstedet. Først de personer, der er værkstedet: Jan og Fríða, og den modtagelse, man får som kunstner og gæst. Man starter som fremmed, og langsomt



*Gallarí Fríðriksvág hevði forvitnisliga framsýning við myndum hjá Øssi Johannesen*

*Mynd: Jan Müller*